# Hetta er tað størsta upplivilsið


Størsta upplivilsið hjá Finni Joensen, eftir at hava koyrt bil í meira enn hálva øld, var at koyra undir Vestmannasundi
Mynd: Edvard Joensen

**Í meira enn 51 ár hevur Finn Joensen í Sandavági koyrt bil. Men at sleppa at koyra undir Vestmannasund er tað størsta upplivilsið hann hevur havt sum bilførari hesi árini, sigur hann**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Edvard Joensen*

**Vágatunnilin:** Bussurin er fullur av fólki. Her er øll »øvrigheitin« í Vágum so sum bygdarráð, løgregla, flogvallarleiðsla og so onkur annar eisini. Tað stendur eitt sindur á at fáa bussin niðan á Háls, og tað rýkur í meira lagi úr honum, heldur onkur.

Men bussførarin heldur væl standa til. Hann er glaður í kvøld og ikki minst spentur.

Nú skal hann fyrstu ferð, eftir at hava koyrt bil, buss, lastbil og tað heila í skjótt 52 ár, uppliva at koyra ein fullan buss av fólki undir Vestmannasundi.

Hetta er ein stór løta hjá tí skjótt 72 ára gamla Finni Joensen í Sandavági.

– Hetta er størsta upplivilsið, eg havi havt sum bilførari nakrantíð, ivast hann ikki í, hóast hann hevur upplivað rættiliga nógv og ymiskt hesi árini.

Hann hevur siglt við Bragd og Gamla Sam. Nýggja Sam og Ternuni umframt avloysaraskipunum. Koyrt lastbil og verið »gribbur«, umframt alt annað, ein bilførari í Vágum upplivir í so langa tíð.

– Tað verður øgiliga gott at sleppa undan at koyra um Høgareyn, fegnast Finn. Tað var mangan ótýdligt í vánaligum veðri at fara eftir Vestmannavegnum. Serliga í kavaroki ella mjørka var vanligt at sita við høvdinum út gjøgnum vindeygað fyri yvirhøvur at síggja vegin, greiðir hann frá.

Nú tað skjótt kann koyrast undir undir Sundinum, verður hetta søga. Eisini fer tað at stytta munandi um farleiðina úr Vágum til Havnar ella inn á Skálafjørðin.

Men tað, sum Finn fegnast mest um, og sum hann væntar fer at hava størstu ávirkanini, verður reglusemið í ferðsluni um Vestmannasund.

Serliga fyri vinnulívið báðu megin Sundið fer hetta at merkja øgiligar batar, heldur hann. Nú kunnu eitt nú lastbilar og bussar sjálvir avgera, nær teir koma og fara. Burtur verða allar bíðirøðirnar í Vestmanna og á Oyrargjógv og har við eisini allir teir dýru spilltímarnir.

Finn ivast ikki í, at tað fer at koma bæði bussum og lastbilum í Vágum tilgóðar, at teir nú kunnu bjóða seg fram allastaðni í javnari kapping við eitt nú bussar og lastbilar úr Eysturoynni og Streymoynni.

Vit eru farin um Hálsin, og Finn minnist aftur á túrarnar til Havnar eftir Oyggjarvegnum.

– Eisini tað er søga nú, og gott tað sama. Tá man fór um Hálsin, bar altíð til at siga, hvussu líkindini vóru í Mjørkadalsbrekkuni, minnist hann. Tí tey bæði støðini líktust altíð.

Oman móti tunnilsvegnum á Fútakletti koma vit. Komin oman til bummin, steðga vit, og sonur Finns, Niels fer út við lykli at lata upp, so vit sleppa ígjøgnum.

Teir eru væl umboðaðir í bussinum í kvøld. Finn er sjálvur triðji úr felagnum Á Giljanesi. Hinir báðir eru líkasum loðsar. Hava koyrt í tunlinum, meðan arbeitt hevur verið, og vita, hvar best er at fara.

Spakuliga fara vit undan brekkuni, til komið er á botn, og fólk gerast spent at vita, nær vit koma fram við seinasta skotinum. Rúgvan liggur enn, so nú vita vit, at vit eru komin yvir um.

– Koyra vit eftir sløttum enn? spyr Finn, sum undrast á, at brekkan ikki er brattari, enn hon er. Hevur ivaleyst hildið, at nú hann var so djúpt, mundi gerast tungt at koma uppaftur.

Nei, hann gerst ovfarin av, hvussu væl hetta roynist. Og fleiri ferðir tekur hann aftur í aftur, hvussu reinur og vakur veggurin er, og hvussu breiður tunnilin tykist.

So koma vit upp aftur Leynamegin, og gamli bilførarin úr Vágum hevur koyrt fyrsta túrin millum oyggjarnar.

Av ovurhuga leggur hann seg á floytuna, meðan fólk klappa inni í bussinum, og lagið er gott.

So gott er tað, at tað hann er steðgaður, fara fólk úr bussinum, eins og tey gera úr øðrum bussum, sum hava flutt gestir, sum skulu heimaftur, undir Sundið.

Ringur verður sligin á brúnni, og sum vera man verður Seyðamaðurin á Sondum tikin. Vágaligt skal tað vera.

Tá komið verður aftur í bussin, situr Niels við róðri. Onkur spyr Finn, um hann ikki skal koyra heimaftur.

– Nei. Eg havi fingið mítt upplivilsi. Nú havi eg latið frá mær, sigur hann.

Tó ikki meira enn so, enn at tá Niels skal venda bussinum í tronganum, er tað Finn, sum er loðsur hjá yngra ættarliðnum.


Fyrstu árini, bilar vórðu fluttir regluliga um Vestmannsund, var við Bragd, sum bilurin hjá Finni her verður tikin umborð á



TØKK
Carl Johansen

Til viðskiftafólk okkara
Verkstaðið er fyribils flutt til Signabøar
BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · Tlf 21 10 13
Boks 3262 · FO-110 Tórshavn





Stóra vetrarútsølan byrjar mánamorgunin 14. jan. kl. 9.00
Allar útsøluvørur -50%
Seytjan
í Tórshavn, tel. 311305 · í Klaksvík, tel. 456517


24 ára gamla Ruth Iansdóttir:

# Tann fyrsta ígjøgnum Vágatunnilin


Ruth Iansdóttir úr Kollafirði hevur arbeitt í Vágatunlinum síðani september 2000. Hon var tann fyrsta, ið koyrdi ígjøgnum tunnilin, tá síðsta skotið var latið av í gjár
Mynd: Jens Kr. Vang

**Ruth Iansdóttir úr Kollafirði hevur koyrt grót úr Vágatunlinum heilt frá fyrsta skotið varð latið av 28. september í ár 2000. Ruth var eisini við nú tunnilin er skotin ígjøgnum, og var hon tann fyrsta, sum koyrdi ígjøgnum tunnilin**

VÁGATUNNILIN
*Ingrid Bjarnastein*

Spurd um, hvussu tað kendist, at vera tann fyrsta, ið koyrdi gjøgnum tann nógv umtalaða Vágatunnilin, svarar Ruth, at tað veit hon ikki.

– Sjálvandi er tað stuttligt og spennandi, men tað er ikki nakað serligt við tí, sigur hon lítillátin.

Tann bert 24 ára gamla Ruth hevur seinasta góða árið havt eitt, sum mong helst vilja kalla tað, mannfólkaarbeiði. Sjálv heldur Ruth ikki, at tað er nakað serligt við tí, og hon hevur als ikki kent seg uttanfyri á nakran hátt. Hon hevur seinasta hálva árið eisini verið einasta konufólkið, ið koyrt hevur. Í byrjanini var ein onnur eisini og koyrdi, men hon gavst. So Ruth hevur í eitt hálvt ár verið einasta høna millum allar hanarnar.

Eisini hevur Ruth fyriskipað alla koyring úr tunnlinum. Hvørja ferð tað hevur verið klárt at koyra grót út hjá NCC, hevur hon ringt til førararnar og biðið teir koma til arbeiðis.

– Hetta hevur verið eitt ógvuliga strævið arbeiðið, fortelur Ruth.

– Arbeiðstíðirnar hava verið ógvuliga óregluligar. Tíðliga um morgunin, seint um kvøldið ella mitt um náttina. Viðhvørt hava vit til dømis arbeitt frá klokkan 02.00 til klokkan 04.00.

Ein Scania 144 hevur verið hennara trúgvi fylgissveinur í arbeiðnum. Stóri blái lastbilurin er tann einasti hon hevur brúkt at koyrt við. – Eg eri eisini punktera ofta, sigur Ruth. – Men at skifta dekk klári eg ikki sjálv, tað má eg hava hjálp til, sigur hon flennandi.

## Koyrt 2000 lass

Ruth metir, at hon man hava koyrt eini 2000 lass. Tilsamans vórðu umleið 500.000 kubikk av gróti í øllum tunlinum. Hvørt lass er 12 kubikk. Hetta vil so siga, at Ruth hevur koyrt 4,8 % av grótinum úr tunlinum við Scania lastbilinum. Nakað tað sama hevur hon eisini koyrt til Kollafjarðar.

Men hvat skal kollafjarðargentan so gera nú? – Frí!, er hon skjót at svara.

– Byrjað verður ikki aftur at koyra fyrr enn um einar seks vikur. Til ta tíð hava førararnir frí. Nú skal alt gravast út, boltast og sproyta betong, og til tað arbeiðið er liðugt fari eg at hava frí.

Tó ætlar Ruth sær at byrja at koyra aftur tá NCC aftur skal hava grót inn í tunnilin. Um hon verður verðandi til tunnilin er liðugur, veit hon ikki at siga, tí hon er vorðin eitt sindur troytt av at koyra lastbil. Lastbilarnir skulu nú gerast í standa, tí teir farast ógvuliga illa av at koyra soleiðis.

Tá hennara »karriera« sum lastbilsførari er liðug, ætlar hon sær í skúla. Ruth hevur tikið hægri handilsskúla, og ein part av HD. Ætlanin er at royna at fáa HD liðugt.